# HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN
FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY

174/1990.

Tórshavn, hin 27. september 1995
Málnr.: 614-95-0006-3

**Kommunala Orku- og brennistøðin**
**Postmoga 226**
**110 Tórshavn**

**Góðkenning sambært løgtingslóg nr. 134/88 um umhvørvisvernd.**

Í skrivi dagfest 28. juni 1995 søkir KOB um umhvørvisgóðkenning, sambært grein 26 í umhvørvisverndarlógini um serliga dálkandi virkir, til at gera eitt øki í eystara Húsahaga til móttøku av septiktangaevju.

Skjøl, sum eru nýtt í góðkenningini:

- Umsókn frá KOB dagfest 28. juni 1995
- Frágreiðing um innrætting og nýtslu av plássinum frá Marin E. Leo ráðgevandi verkfrøðingi
- Tekningar av økinum nevndar 202, 203 og 204 yvir ætlan av evjuplássinum

Um móttøkuøkið:

Nýggja móttøkuøkið til spillvatnsevju verður innrættað beint eystanfyri tyrvingarplássið. Roknað verður við at móttaka umleið 1.000 $m^3$ av evju um árið. Økið er 3000 $m^2$ til støddar.

Ætlanin er at fylla upp við evju til eitt dýpi av 1,5 m.

Girt verður um økið.

Debesartrøð, FR-100 Tórshavn, Faroe Islands, Tlf. Int. + 298 15300, Fax Int. + 298 10508

Upplýsingar um dálking og dálkingaravmarkandi atgerðir:

Verjugarður verður stoyptur rundanum lagununa, og botnurin verður steinsettur við 20 cm og hellur 60 $^{0}$/oo ímóti verndar- og uppsamlingsgarðinum, síðan verður eitt 10 cm drenlag gjørt við skervi. Drenvætan verður leidd burtur frá økinum við drenleiðing norðast á plássinum og í ein botnfellingarbrunn. Regnvatn, frá økinum omanfyri, verður við grøv veitt uttan um goymsluplássið.

Treytir fyri góðkenning:

Grundað á fyriliggjandi upplýsingar, innrættning og rakstur av evjuøkinum í Húsahaga, gevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan, samb. grein 26 í lóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, og kunngerð nr. 186 frá 5. november 1994 um spillvatnsevju, Kommunalu Orku- og Brennistøðini góðkenning til at gera og reka eitt móttøkupláss fyri spillvatnsevju í Tórshavnar kommunu undir fylgjandi treytum:

**Innrætting:**

1. Økið, sum nýtt verður til goymslu av spillvatnsevju, skal vera innan fyri inngirt øki eystan fyri tyrvingarplássið í Húsahaga. Ávíst á tekning dagfest 2. juni 1995.
2. Botnurin á lagununi skal hella min. 60 $^{0}$/oo og vera innrættaður við 20 cm steinseting og min. 10 cm skervi við einum vælvirkandi dreni.
3. Øll frárenning frá móttøku- og goymsluplássi skal leiðast í ein botnfellingarbrunn og beinleiðis í pumpubrunn til kommunalu kloakkina. Møguleiki skal vera fyri sýnistøku av frárenslinum í botnfellingarbrunninum.
4. Vøllgarður skal vera runt um plássið, sum tryggjar, at yvirflatuvatn frá økinum uttanum verður leitt uttan um lagununa.
5. Hegn skal setast upp um økið, har rottangaevjan verður løgd.
6. Net ella tættmeskað hegn skal spennast yvir økið, sum er so tætt, at smáfuglur ikki sleppur at evjuni.
7. Neyðugur vaskiútbúnaður skal vera á plássinum.

**Rakstur:**

8. Bert spillvatnsevja má viðgerast á plássinum.

9. Bind o.a brennbart skal skiljast frá og beinast til brennistøðina.

10. Lagið av evju á plássinum skal í mesta lagi vera 1,5 m tjúkt og altíð undir 1 metur frá yvirkantinum á garði og yvirtromu (neti).

11. Evjan skal á móttøkuplássinum sóttreinsast við kálki, soleiðis at pH verður omanfyri 11 (tvs. umleið 300g pr. kg turrevni).

12. Botnfellingarbrunnurin skal eftirhyggjast javnan, og tømast so ofta neyðugt er.

13. Kommunala Orku- og brennistøðin hevur ábyrgdina av, at evjuplássið verður rikið sambært treytinum í hesi góðkenning.

**Eftirlit:**

14. Kommunala Orku- og Brennistøðin skal á hvørjum ári gera mikrobiologiskar og kemiskar kanningar av evjuni. Kanningarætlanin skal gerast í samráð við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna.

15. Kanningar av frárenslvatninum skulu gerast minst tvær ferð um árið. Kanningarnar skulu gerast í samband við eftirliti annars á tyrvingarplássinum.

16. Rakstrarbók skal førast yvir móttiknar nøgdir, og skal Heilsufrøðiliga Starvsstovan í januar mánaða á hvørjum ári hava fráboðan um móttiknar nøgdir ári fyri.

17. Rakstrarbók skal førast yvir hendingar og rakstur av plássinum.

18. Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur eftirlit við evjuplássinum. Eftirlitið verður útint samb. kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

19. Eftirlitsmyndugleikin hevur, til eina og hvørja tíð, heimild at kanna viðurskiftini á evjuøkinum og gera vart við møguligar skeivleikar og krevja neyðugar broytingar hesum viðvíkjandi.

**Góðkenning:**

Tá evjuplássið er klárt at taka í nýtslu, skal eftirlitsmyndugleikin á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni fráboðast, so trygd fæst fyri, at ásetingarnar í góðkenningini eru fylgdar, áðrenn raksturin á økinum byrjar.

Skal avvatnaða lagraða evjan nýtast t.d. at tyrva ella taða við, skal søkjast um serskilda góðkenning.

Sambært § 26 í umhvørvisverndarlógini má virkið ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið hevur ávirkan á dálkingarviðurskiftini hjá virkinum, fyrr enn víðkanin ella broytingin er góðkend

**Kæra:**

Avgerðir, tiknar av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, kunnu sambært grein 66 í umhvørvisverndarlógini kærast til Føroya Landsstýri. Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, avgerðin er almannakunngjørd. Kæran skal sendast Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum síðani sendir kæruna til Føroya Landsstýri.

Tórshavn tann 27. september 1995

Marjun Hanusardóttir
Stjóri

Jacob P. Joensen
Deildarleiðari